### Valborg Simonsen verður sett sum lærari

Á kommunustýrisfundinum 30. august 1914 er einans eitt mál á skránni, og tað er at gera innstilling til nýggjan lærara á Eiði.

Tveir umsøkjarar vóru til starvið, og bygdaráðið samtykti at innstilla Valborg Simonsen av Velbastað sum nr. 1. Hon tók við starvinum við Eiðis skúla 1. november sama árið, og var hon lærari á Eiði í samfull 40 ár, til hon fór úr starvinum 1. november 1954.

Valborg var borin í heim á Velbastað í 1889, var dóttir Johan Michael, kongsbónda, og Elisabeth Johannu Simonsen. Valborg tók læraraprógv á læraraskúlanum í Havn í 1911 og var lærari í Vági í trý ár, áðrenn hon kom norður til Eiðis. Byrjanarlønin var kr. 500,- um árið.

Hon var gift við Johan Petur Johansen, einkjumanni. Valborg og Johan Petur áttu eingi børn.

### Fyrstalærarastarvið á Eiði

Eftir at Johannes Hans Petersen fór úr lærarastarvinum á Eiði summarið 1915, varð lýst eftir nýggjum fyrstalærara. Lønin varð sett til kr. 600 um árið. Fýra umsóknir vóru til starvið. Kommunustýrið samtykti at innstilla funningsmannin Theodor Dahl.



*Valborg Johansen var lærarinna á Eiði 1914-1954. Hon var gift við Jóan Peturi, ið var sonur Pól í Britustovu.*



*Mynd av Hamrinum á vetrardegi. Lossikranin varð settur upp av Krusehandlinum. Stóraneyst sæst høgrumegin á myndini.*

Hann var føddur í 1884, sonur Óla Hans Dahl úr Dali og Onnu, úr Funningi. Pápi hansara var lærari við Gjógv og í Funningi. Hann fór sum bláðungur til Havnar at ganga í skúla, og har tók hann læraraprógv í 1908.

Áðrenn Theodor kom til Eiðis, hevði hann verið lærari í Sandvík í 6 ár. Kona hansara, Anna Sofia, var ættað úr Sandvík.

Theodor Dahl røkti starvið sum lærari á Eiði, til hann doyði 15. desember 1920. Eftir deyða mansins flutti Anna Sofia við sínum fýra børnum til Funnings. Tað elsta var 5 ár og tað yngsta bert nakrar mánaðir gamalt.

## Umbygging av skúlanum

Í 1915 samtykkir kommunustýrið at byggja trimpul upp á skúlan, har lærarin skal hava sína íbúð. Niðriundir skulu tvær skúlastovur gerast. Umsókn um stuðul til umbyggingina var tá longu send løgtinginum.

Árið eftir kemur skriv frá Færø Amts

skoledirektion um, at 1400 kr. eru settar av á fíggjarlógini til umbyggingina av skúlanum á Eiði.

Í gerðabókini hjá kommunustýrinum 19. desember 1916 stendur, at umbyggingin av skúlanum er fyribils útsett orsakað av heimsbardaganum.

Í 1920 verða neyðugu fyrireikingarnar gjørdar at fremja ætlaðu umbyggingina av skúlanum frá einari stovu til tvær, soleiðis, at íbúðin hjá lærarانum verður skúlastova nr. 2, og at hann flytur uppá. Um hetta mundið eru 103 skúlabørn á Eiði.

Trimpul kom ongantíð á skúlan.

## Læknaloysi

Gudmund Effersøe, sum hevði røkt læknastarvið í Eiðis læknadømi síðani 1912, segði upp at fara úr starvi í juli 1916. Kommunustýrið heitir á Amtið um at lýsa starvið leyst og upplýsir samstundis, at lønin hjá Effersøe lækna var kr. 5.000,- í árinum 1915, íroknað søla av apoteksvørum.

*Útsýni av Skýlindalskletti norður á Horn.*



## Telefonstøðin flytur

Í 1917 sigur Óli í Jógvansstovu telefonina frá sær, og lýst verður eftir nýggjum telefonpassara. Nakrar umsóknir komu inn, og samtykt verður á fundi í kommunustýrinum 23. juni at lata Dortheu Joensen, í Pálsstovu, passa telefonina framyvir. 1. juli 1919 samtykkir kommunustýrið at hækka telefonlønina hjá Dortheu við 80 krónum, upp í 160 krónur um árið, hølið íroknað.

## Vegur oman á Møl

Sama árið samtykkir kommunustýrið at senda umsókn um studning til vegagerð av Mølini og heim móti Heimaravatni.

18. januar 1919 samtykkir kommunustýrið at fara undir hesa vegagerð.

## Frí koyring

Á fundi framman undan jólum í 1917 samtykkir kommunustýrið at ganga eini umsókn frá læraranum, Valborg Simonsen, á møti um frían flutning millum Eiði og Norðskála, har hon eisini var lærari í millumbilum.

## Vegur suður í Nesið

Í 1917 sendir kommunustýrið umsókn um studning til at gera veg suður í Nesið og grundar hetta við, at hetta hevði útvegað arbeiði til bygdina og hevði verið ein stór hjálp hjá teimum mongu, sum hava torv fram við og sunnan fyri Eiðisvatn.